Álit

í

løgtingsmáli nr. 48/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin) (Javning av upphæddum og ferðaútreiðslur í sambandi við samveru)

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, hevur lagt málið fram 4. november 2020, og eftir 1. viðgerð 19. november 2020 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 24. november og 1. desember 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Barnaverndarstovuna, Fosturforeldrafelagið, Kommunufelagið og við landsstýrismannin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur.

Undir viðgerðini er ført fram, at tað vil verða í so nógv umsiting hjá Barnaverndartænastuni at skula gera eina meting í hvørjum einstøkum føri, um Barnaverndartænastan skal bera ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru, um foreldrini ikki sjálvi megna at halda hesar útreiðslur.

Tískil hevur ein samd nevnd, soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 1, nr. 1 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 8.* Barnaverndartænastan ber, eftir umbøn, ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru innanlands. Barnaverndartænastan ber ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru uttanlands, um foreldrini ikki sjálvi megna at halda hesar útreiðslur."

Viðmerkingar:
Tá talan er um samveru millum foreldur og børn í Føroyum, ber Barnaverndartænastan ferðaútreiðslurnar eftir umbøn. Tað er einki krav um at foreldur ikki skulu megna at bera útreiðslurnar.
Tá talan er um samveru millum foreldur og børn, har neyðugt er, at antin barnið/børnini ella foreldrini skulu ferðast av landinum, ber Barnaverndartænastan ferðaútreiðslurnar, um foreldrini ikki sjálvi megna at bera útreiðslurnar.
Víst verður eisini til serligu viðmerkingarnar í lógaruppskotinum.

Við hesi broyting tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 3. desember 2020

Uni Rasmussen
formaður

Sirið Stenberg
næstformaður

Aksel V. Johannesen

Hervør Pálsdóttir

Edva Jacobsen

Jóhan Eli Poulsen

Erhard Joensen